ar



” – Vit, sum eru um børnini, eiga at finna javnvág millum at verða bergtikin av øllum hesum nýggja og samstundis at seta mørk.

arar sjálv seta dám á út frá sínum støði, og ráðstevnan endar við kjaki, har fyrilestrahaldarar og onnur luttaka.

Oyvind Kvello, úr Noregi røður um, hvussu kunningartøkni ávirkar menningina hjá børnum. Elisabeth Milsgaard og Kate Nielsen úr Danmark siga frá royndum við at nýta KT sum journal og dokumentation í heilsurøktini. Birgitte Lindberg og Kerstin Øhrling úr Svøríki greiða frá samskifti millum neonatala deild og familju við kunningartøkni.

Magnus Bjørk úr Svøríki tosar um viðgerðarheim fyri børn og ung við ovurnýtslu av KT, og føroyska Silvia Henriksdóttir fer helst at leggja nýggja gransking fram á ráðstevnuni. Helle Rabøl Hansen, ið er kend frá sjónvarpinum sum serfrøðingur í happing, fer at greiða frá sínum arbeiði. Eisini kemur danin Ole Bay Jensen, frá ASPIT verkætlanini, sum hevur serfrøði við ungum aspergerarum og kt.

Til ber at lesa meira um ráðstevnuna á heimasíðuni hjá felagnum: www.ssf.fo. Har verður eisini víst á, hvussu tekning fer fram innan 1. mars.



*Áhugafelagið hjá føroyskum barnasjúkrarøktarfrøðingum, FBS, skipar fyri ráðstevnuni um børn og KT, sum verður í Norðurlandahúsinum 6. til 8. september. Tekningarfreistin er úti 1. mars. Bjørghild Djurhuus, heilsusystir, er forkvinna í nevndini.*




Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Samskipari til Løkjukaféina

Løkjukaféin er eitt tilboð til sinnisveik í aldrinum 18 – 67 ár, sum ynskja sosiala samveru og felagsaktivitetir saman við øðrum.

Endamálið er at stuðla fólki at fáa innihald og struktur í gerandisdagin og betra um lívsgóðskuna hjá teimum. Samskiparin hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum av kaféini. Hetta umfatar fakliga og fíggjarliga ábyrgd.

**Førleikar:**
Vit vænta, at tú:
- hevur eina viðkomandi sosial- ella heilsufakliga útbúgving.
- hevur skil fyri roknskaparhaldi, og at tú hevur hug og áræði at leggja afturat tínari vitan tað, sum krevst, fyri at kunna røkja samskiparastarvið til fulnar.
- hevur evni og vilja til at samstarva við starvsfelagar og leiðslu á øllum økjum.

**Stuðulstænastan bjóðar:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp.
- Kunning í arbeiðnum og supervisión.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur. Setanarøkið er Nærverkið, og fyribils tænastustaður er Løkjukaféin. Starvið verður sett 01.04.2007 ella skjótast møguligt aftaná.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Odu Jóhansdóttir ella Regin Johansen á telefon 354020.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av próvskjølum, viðmælum og C.V. skal sendast til:
Stuðulstænastan
Løkjatún 1
160 Argir
Stílað: Regin Johansen, deildarleiðari

**Umsóknarfreist: 19. februar 2007.**

Stuðulstænastan

## Starvsfólk til Løkjukafeina

Løkjukaféin er eitt tilboð til sinnisveik í aldrinum 18 – 67 ár, sum ynskja sosiala samveru og felagsaktivitetir saman við øðrum.

Endamálið er at stuðla fólki at fáa innihald og struktur í gerandisdagin og betra um lívsgóðskuna hjá teimum.

**Førleikar:**
Vit vænta, at tú:
- Hevur eina viðkomandi sosial- ella heilsufakliga útbúgving.
- Hevur hug og hegni til at arbeiða við fólki, sum eru sinnisveik.

**Stuðulstænastan bjóðar:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp
- Kunning í arbeiðnum og supervision

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Tann, íð settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur. Setanarøkið er Nærverkið, og fyribils tænastustaður er Løkjukaféin. Starvið verður sett 01.04.2007 ella skjótast møguligt aftaná.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Odu Jóhansdóttir ella Regin Johansen, á telefon 354020.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av próvskjølum, viðmælum og C. V. skal sendast til:
Stuðulstænastan
Løkjatún 1
160 Argir
Stílað: Regin Johansen, deildarleiðari

**Umsóknarfreist: 19. februar 2007.**

**Les meira um størvini á www.naerverk.fo / leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

sansir.fo

www.naerverk.fo